## Eftir útivallarmáli

Venjarin hjá FC Barcelona, Josep Guardiola, ætlar at fáa okkurt útivallarmál við sær heimaftur, tá Champions League-meistararnir í kvøld vitja Arsenal í fjórðingsfinaluni. – Vit vita jú, at útivallarmálini hava nógv at siga fyri seinna dystin, sigur hann. Mong hava helst FC Barcelona sum favoritt, men tað pilkar ikki við sjálvsálitið hjá danska Arsenal-framherjanum, Nicklas Bendtner: – Hóast teir eru favorittar, hava vit minst líka góðan møguleika at fara víðari, sigur hann.



## Hatar italskan fótbólt

Hóast José Mourinho er venjari hjá italska Inter, sum í kvøld spælir fjórðingsfinalu í Champions League ímóti russiska CSKA MOskva, dámar honum ikki italskan fótbólt. – Tað er sera einfalt. Eg eri glaður fyri Inter, men ikki glaður fyri italskan fótbólt. Og tær kenslurnar ganga báðar vegir, tí italskur fótbóltur er heldur ikki glaður fyri meg, segði Mourinho á fyrsta tíðindafundinum í seks vikur, har hann svaraði spurningum frá italskum fjølmiðlafólkum.



# Terji greitt á odda

**Ein lítil sensatión tykist vera ávegis á Giljanesi, har Terji Petersen hevur lagt seg greitt á odda í FM-kappingini í talvi**

Nú fimm umfør eru telvað í FM-kappingini í talvi fyri eintaklingar á Giljanesi, hevur Terji Petersen, úr Klaksvík, lagt seg á odda í landsliðsbólkinum – hálvtannað stig framman fyri restina.

Hóast styrkimettur sum nummar seks í kappingini, hevur hann vunnið fýra talv og telvað eitt javnt, og heldur tí fast um góðu gongdina frá liðkappingini, har hann vann átta av níggju møguligum sigrum.

Lagt er upp til sera spennandi seinnu hálvu í kappingini, tí fleiri telvarar liggja framvið, skuldi møguleikin verið har, nú Terji síðstu fýra umførini telvar ímóti Torkili Nielsen, Olaf Berg, Rógva Egilstoft Nielsen og Hans Kristiani Simonsen.

Merkisvert er eisini, at millum teirra, ið jagstra Terja, er bert 12 ára gamli Høgni Egilstoft Nielsen, ið eitt nú hevur vunnið á favorittinum, Olafi Berg.

-mørk

# Alt kostar á ólavsøku



**Hóast fjøldin á ovara vølli í Gundadali var stór, tá Víkingur á ólavsøku í fjør vann Løgmanssteypið, hevði Fótbóltssambandið hall av dystinum**

Mynd: Jens Kr. Vang

**Semja fekst ikki millum Fótbóltssambandið og Tórshavnar kommunu um, hvussu nógv tað skal kosta Fótbóltssambandinum at brúka ovara vøll í Gundadali á ólavsøku, og tí verður finalan um Løgmanssteypið í staðin spæld 1. august**




Hilmar Jan Hansen

Í gjár kunngjørdi Fótbóltssambandið, at av tí at semja fekst ikki um at spæla finaluna í kappingini um Løgmanssteypið á ólavsøku, er hon flutt til 1. august. Ósemjan snýr seg um kostnað, tí Tórshavnar kommuna vil hava 100.000 krónur fyri at lata ovara vøll í Gundadali til steypafinaluna á ólavsøku, men tað er Fótbóltssambandið ikki sinnað at rinda.

Forsetin í Fótbóltssambandinum, Christian Andreasen, segði við útvarpið hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið, at tá Tórshavnar kommuna og havnarfeløgini, HB og B36, høvdu fingið sítt í fjør, hevði Fótbóltssambandið undirskot av steypafinaluni.

Hetta vil Fótbóltssambandið ikki hava at endurtaka seg og hevur tí skotið upp, at tey bæði feløgini, sum spæla steypafinaluna, fáa ein triðing av inntøkunum, meðan Tórshavnar kommuna fær ein triðing og Fótbóltssambandið ein triðing. Men hesa loysnina vil kommunan ikki hava.

### Tænastur kosta

– Vit hava einki ímóti, at steypafinalan verður spæld á ólavsøku, men vit kunnu ikki lata fyri einki tær tænastur, sum verða latnar í sambandi við finaluna. Tey flestu hava frí tá, men vit hava nógv fólk til arbeiðis, og sum alt annað á ólavsøku, kostar tað, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sum ikki heldur prísin vera ov høgan:

– Vit gera vøllin kláran og taka okkum av allari uppruddingini aftaná, umframt at bæði HB- og B36-húsið standa opið, so fólk kunnu fara inn onkrastaðni. Eisini syrgja HB og B36 fyri innkrevjingini, samstundis sum tey missa møguligar inntøkur av øðrum dystum, tey kundu spælt á ólavsøku, var tað ikki fyri steypafinaluni.

Borgarstjórin leggur aftrat, at um steypafinalan á ólavsøku varð marknaðarførd ordiliga, skuldi einki verið til hindurs fyri at fylt Gundadal til ársins fótbóltsdyst, sum hann tekur til.

# Støkk fingið byggiloyvi

**Fimleikafelagið Støkk hevur fingið byggiloyvi til nýggju fimleikahøllina í Runavík, sum bæði hevur høll til amboðsfimleik og estetiskan fimleik**

Tað er TN Bygging, sum skal byggja nýggja fimleikahøllina, og nú er komið so langt, at Runavíkar kommuna í farnu viku einmælt samtykti at geva byggiloyvi. Eisini er tilsøgn fingin um fígging frá Norðoya Sparikassa.

Ludvík Justinussen, formaður í bygginevndini, sigur við Rás 2, at tey fegnast um, at teir síðstu brikkarnir nú eru komnir á pláss. – Gongst sum ætlað, verður farið undir útgrevsturin beint eftir páskir, og um tvey ár stendur høllin liðug, sigur hann.

Talan er um ein tilsamans 1.700 fermetra stóran bygning, sum fer at kosta 21,5 milliónir krónur. Tá fer Støkk undir einum taki at ráða yvir tveimum hallum, einari til amboðsfimleik og einari til estetiskan fimleik, ið báðar lúka øll altjóða krøv.

Ludvík Justinussen sigur, at høllin er gjørd til at hýsa øllum fimleikinum hjá Støkk, og tað verður eitt stórt framstig, tí sum er, húsast felagið í fleiri hølum.

hil

# Billard-FM á páskum

Føroyameistarakappingin í billard fyri einstaklingar verður í Havn á páskum. Tilsamans 12 spælarar eru við, og spælt verður í Havnar Klubba, har innleiðandi umfarið verður skírisdag og langafríggjadag, báðar dagar frá klokkan 14. Spælt verður í trimum bólkum og tveir teir bestu í hvørjum bólki koma í finaluumfarið, sum verður spælt páskaaftan.

Kristian Sune Høgnesen úr Klaksvíkar Billardfelag er føroyameistari, so hann skal royna at verja heitið í kapping við hinar 11, sum nú bjóða av. Hinir spælararnir eru Hallur Joensen, Sonhard Johannesen, Torkil Jacobsen og Allan Larsen úr Klaksvíkar Billardfelag, Niels Nielsen, Jógvan Jørgensen og Gunnleif Danielsen úr Havnar Klubba, Steinbjørn í Dali og Jan Müller úr Mimi, og Max Rasmussen og Gullok Svalbard úr Tvøroyrar Billardfelag.

hil